## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Andøvsgul upp í ein strúk av landnyrðingi og norði og sólglottar, men eisini okkurt ælið, partvís kavi. Hitin millum 1 og 4 stig.




**Veðrið hósdagin:**
Hann minkar vindin niður í lot av norði ella av ymsum ættum og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitalagið millum ÷1 og +2 stig.




**Veðrið fríggjadagin:**
Hann veksur vindin upp í hvassan vind av landnyrðingi og kavaælingur, men onkur sólglotti. Hitin millum frostmarkið og +3 stig.

**Veðrið leygardagin og sunnudagin:**
Gul til stívt andøvsgul av landnyrðingi og sólglottar, men eisini kavaælingur. Hitalagið um frostmarkið.

# Bilurin hjá Schumacher

FERRARI
*Eyðun Klakstein*

Sosialurin í Runavík: Tað fyrsta fólk renna seg í, tá ið tey koma á Fiskivinnustevnuna í Runavík, er ein bilur, sum sjálvasti Michael Schumacher hevur koyrt í.

Talan er um ein Formel 1 bil hjá Ferrari, sum stendur á básinum hjá Shell. Orsøkin til tað er, at Shell letur brennievni til Ferrari.

Tann bilurin, sum stendur í Runavík, er frá 1997, og tað er púra vist, at Schumacher sjálvur hevur koyrt bilin.

Førararnir av Formel 1 bilunum fylla ikki nógv. Setrið á hesum Ferrari-bilinum er gjørt til gumpin á Schumacher, og við sínum 167 setrimetrum og 65 kilo hevur hann ikki brúk fyri nógvum plássi.

Sjálvur bilurin skal í mesta lagi viga 500 kilo, tá ið førarin situr í, og tangin er fullur. Hesin bilurin vigar 200 kilo, sum hann stendur, tí eingin motorur er í honum.

Ferrari hevur vunnið fleiri enn 150 sigrar í Formel 1 kappingini, og aftur í ár er Schumacher við heilt har frammi.

Formel 1 bilarnir hjá Ferrari eru broyttir eitt sindur síðani 1997. Millum annað eru teir nú einar 20 sentimetrar smalari, so teir ikki kunnu koyra eins skjótt í svingunum. Hetta er fyri at gera kappingina meira spennandi, so tað ber til at yvirhála í svingunum.

Tað er stórur áhugi fyri bilinum, og tað stendur støðugt nógv fólk uppi yvir bilinum og hyggur.

Ferrari-bilurin verður standandi allar dagarnar, meðan stevnan er.




*Stórur áhugi er fyri at síggja Formel 1 rasaran hjá Ferrari, sum stendur á básinum hjá Shell*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

**Hitalagið kring knøttin**

| | |
|---|---|
| Illulisat | 1 |
| Nuuk | 3 |
| Qaqortoq | 2 |
| Ammassalik | ÷1 |
| Saint John's | 11 |
| Halifax | 13 |
| Reykjavík | 7 |
| Seyðisfjørður | 4 |
| Tórshavn | 7 |
| Lerwick | 7 |
| Aberdeen | 9 |
| London | 13 |
| Tromsø | 3 |
| Bergen | 10 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 3 |
| Keypmannah. | 14 |
| Helsinki | 3 |
| Moskva | 5 |
| Berlin | 17 |
| Warzawa | 15 |
| Kiev | 17 |
| Bukarest | 21 |
| Paris | 23 |
| Madrid | 23 |
| Róm | 19 |
| Malorca | 25 |
| Athen | 20 |
| Malta | 20 |
| Tunis | 29 |
| Beijing | 23 |
| New Dehli | 34 |
| Bangkok | 28 |
| Jakarta | 31 |
| Sydney | 22 |
| New York | 23 |
| Miami | 26 |
| Los Angeles | 17 |
| Meksikobýur | 27 |
| Panama | – |
| La Paz | 15 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 21 |

## LUFTTRÝSTIÐ




Eitt lágtrýst, 986 hPa. eystan fyri Skotland fer í landnyrðing og vestan fyri lágtrýstið rekur køld luft av norði móti Føroyum.




Lágtrýstið við Vestur-Noreg fer spakuliga í landnyrðing. Lágtrýstið yvir Írlandi fer eystureftir.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 28/04 kl. 06[00]– 29/04 kl. 06[00]. Hitin í gjár: 7,4°
Minsti hiti máldur í apríl: ÷9,9° Mesti hiti máldur í apríl: 18,3°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 8,0 mm – mált frá 28/04 kl. 06[00]–29/04 kl. 06[00]
Avfallið higartil í apríl: 41,3 mm

**Vika 17 – 27. apríl**
1. Centrum:
**63 - 44 - 30 - 32 - 67 - 42 - 34 - 50 - 40 - 31**

1. Ramme:
**48 - 06 - 05 - 69 - 39 - 17 - 27 - 03 - 59 - 75 - 15 - 16 - 33 - 47 - 65 - 68 - 07 74 - 13 - 14 - 36 - 04 - 61 - 19 - 70**

Fuld plade:
**09 - 66 - 51 - 37 - 29 - 01**

Fri spil: **B__EN**

| | | |
|---|---|---|
| Fuld plade: | 1. pr. | **320.048,- kr.** |
| 1. Ramme: | 2. pr. | **55.205,- kr.** |
| 1. Centrum: | 3. pr. | **27.617,- kr.** |
| Ramme: | 4. pr. | **791,- kr.** |
| Centrum: | 5. pr. | **146,- kr.** |

Sosialurin tekur onga ábyrgd av møguligum villum

## VESTFALLSKYRRINDI

23. apríl: Seinna kvarter
1. mai: Tendring/Mánin longst frá jørðini

Kelda. Álmanakkin 2003

| Dagur | Suðuroyar-/Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/Sundalagnum fp. | sp. | Vestmannasundi fp. | sp. | Mykinesfirði fp. | sp. | Nólsoyarfirði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvannasundi fp. | sp. | Fugloyarfirði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 30. apr | 06.50 | 19.10 | 05.50 | 18.10 | 06.05 | 18.25 | 08.50 | 21.10 | 09.50 | 22.10 | 05.05 | 17.25 | 04.05 | 16.25 | 07.05 | 19.25 | 08.05 | 20.25 | 06.35 | 18.55 | 07.50 | 20.10 |
| 1. mai | 07.30 | 19.51 | 06.30 | 18.51 | 06.45 | 19.06 | 09.30 | 21.51 | 10.30 | 22.51 | 05.45 | 18.06 | 04.45 | 17.06 | 07.45 | 20.06 | 08.45 | 21.06 | 07.15 | 19.36 | 08.30 | 20.51 |
| 2. mai | 08.10 | 20.30 | 07.10 | 19.30 | 07.25 | 19.45 | 10.10 | 22.30 | 11.10 | 23.30 | 06.25 | 18.45 | 05.25 | 17.45 | 08.25 | 20.45 | 09.25 | 21.45 | 07.55 | 20.15 | 09.10 | 21.30 |
| 3. mai | 08.50 | 21.11 | 07.50 | 20.11 | 08.05 | 20.26 | 10.50 | 23.11 | 11.50 | — | 07.05 | 19.26 | 06.05 | 18.26 | 09.05 | 21.26 | 10.05 | 22.26 | 08.35 | 20.56 | 09.50 | 22.11 |

5 707265 100036 >